# handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2011 BLAÐ NR. 37 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# ÁRSAÐALFUNDIR: 30. mars 2011

Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags hava ársaðalfund mikudagin 30. mars 2011 kl. 19.00 í hølum felagsins Stoffalág 60.

**Havnar Handverkarafelag:**

Skrá samb. § 21 í lógini:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá farna árinum
3. Roknskapur til góðkenningar
4. Innkomin mál
5. Val av nevnd
6. Val av grannskoðara
7. Ásetan av limagjaldi
8. Ymiskt

**Eftirlønargrunnurin:**

Aftaná aðalfundin hjá Havnar Handverkarafelag verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:

Skrá samb. § 8 í viðtøkunum:

A. Val av fundarstjóra
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum

**Í blaðnum hesa ferð:** ............ **síða**


Ársaðalfundir: 30. mars 2011 ............ 2
Vánaligar samanleggingar ............ 3
Feðgar á ferð: Bogi og Birgir ............ 6
Tórbjørn Petersen: Brátt 46 ár í starvi hjá somu fyritøku ............ 15
Kristian á Dul um Tórbjørn ............ 20
Søgan aftanfyri P/F Maria Poulsen. ............ 22
Barometrið: Rasmus Rasmusen. ............ 28







# VÁNALIGAR SAMANLEGGINGAR

Í seinastuni er komið í ljósmála, hvussu vánalig støðan er vorðin hjá fleiri almennum stovnum. Eitt dømi av mongum er Arbeiðseftirlitið.

Arbeiðseftirlitið verður nú lagt undir Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at umsita. Tað merkir sonevndar rationaliseringar og uppsøgn av starvsfólkum.

Hettar er okkum óskiljandi. Stovnurin hevur illa nokk klára seg við teimum játtanum, sum hava verið. Hetta er álvarsamt, tí eftirlitsuppgávurnar hjá stovninum eru álagdar við lóg.

Tað einasta rætta var at sett meiri eftirlitsfólk á stovnin, soleiðis, at hann var førur fyri at røkja tær skyldur hann hevur, til gagns fyri tey mongu starvsfólk, sum hvønn dag arbeiða við ymiskum vandamiklum uppgávum.

Hettar kann koma samfelagnum aftur um brekku, við arbeiðsvanlukkum av vantandi trygd tí, at stovnurin skuldi spara. Men her er aftur eitt dømi um politiska avgerð, sum er tikin í óðum verki, og als ikki er umhugsa.

Aðrastaðni rundanum okkum roynir man at stramma upp, viðvíkjandi trygdini, men soleiðis er tað tíverri ikki her hjá okkum.



Ein kann freistast til at halda, at mannalív einki hava at siga fyri okkara fólkavaldu.

Vónandi glógvar í onkrum, sum dugir at síggja galskapin í hesum politikki, og broytir hugsan áðrenn skaðin er hendur.

Havnar Handverkarafelag, er harðliga ímóti, at Arbeiðseftirlitið verður niðurpínt og avskeplað, og tekur undir við bæði FA og Starvsmannafelagnum í teirra niðurstøðu.

**Eli Brimsvík, ábyrgdarblaðstjóri**


**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo






Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

*Upplatingartíðir :*
móna, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
**www.gassola.fo**

# FEÐGAR Á FERÐ: Bogi og Birgir

Mong dømi eru um, at ung velja sær somu útbúgving sum annað av foreldrunum.

Hjá handverkarum er tað rættuliga vanligt, at dreingir velja sær somu útbúgving sum pápin.

Henda veruleika fara vit at taka upp í Handverkarunum undir heitinum **„Feðgar á Ferð“.**

Í hesum blaðnum hava vit fingið Birgir og Boga Krossteig at luttaka.



## Bogi Krossteig hevur orðið:

Eg eri føddur í Havn 8. mai 1987. Var næmingur í Eysturskúlanum í 10 ár.

Fór í læru sum múrari í februar 2005, og var liðugur í november 2008.

Skúlaskeiðini vóru øll í Svendborg í Danmark. Skúlin í Svendborg er heilt einastandandi. Tað er ein sera vælvirkandi og seriøsur skúli, har lærarаrnir allir eru væl fyri og vilja gera alt fyri næmingarnar.

Í ár er so ætlanin at fara undir hægri lestur, bygningsverkfrøði.

### Múrarafakið

Tað besta við múrarafakinum er at sleppa at gera útfordrandi og avbjóðandi flísa arbeiðir, bæði á vegg og gólv.

Og tað mest keðiliga arbeiði er uttan iva betong- umvælingar.

Eg havi altíð verið við pápa mínum til arbeiðis. Fyrstu ferð eg var við honum, umvældu vit trappurnar uttanfyri Gamla Bókhandil. Eg var bara 5-6 ára gamal tá og trappurnar halda enn.

Múrarafakið sigur mær nógv, tí tað er rættiliga traditionelt. T.d. hava timburmenn fingið skrúvumaskinur og málarar góðar pussimaskinur. Og eg unni teimum tað so inniliga. Men skalt tú múra eini hús, er tað enn við hond og skeið.

### Tónleikur

Fyrsta plátan eg sjálvur spældi, var ein Elvis pláta. Og mær dámdi so sera væl røddina hjá honum. Og aftaná hann, byrjaði eg eisini at spæla pláturnar hjá pápa mínum. Og sigast má, at hann hevur góðan „smag“.

Tónleikurin sum pápi mín lurtar eftir er í stóran mun tann sami, sum eg lurti eftir. Men tað eru nøkur løg, sum vit ikki heilt semjast um, um tey eru góð ella vánalig.

Tónleikurin, eg lurti mest eftir er Pink Floyd, Elvis, Simon & Garfunkel, Joe Cocker, Deep Purple, Procol Harum, men fyri tíðina er tað mest David Gilmour.

### Tónleika útgávur

Tónleika útgávurnar hjá pápa mínum eru allar sera góðar. Hann hevur millum annað sungið saman við Frændum, Edvard Nyholm Debes, MC-hár og so syngur hann eisini við Tórshavnar Manskóri.




### Bogi um pápan

Pápi mín hevur eina risa stóra last av erfaring, sum hann gjarna gevur víðari. So tað eru fá ting hann ikki maktar at finna eina loysn til. Hann hevur eisini eitt einastandandi „GO“.

Hann koyrir altíð á og fær alt, sum er keðiligt frá hondini fyrst. Og so er bara tað stuttliga eftir.

Men so hevur hann eisini dagar, har tað bara ikki gongur eftir hansara vilja. Tá kann hann blíva strævin og mopsutur. Til alla lukku eru teir dagarnir sera fáir.

### Ikki keðiligt

Nógv halda tað verða ótrúligt at pápi mín og eg klára at arbeiða saman. Eg havi eisini hoyrt um feðgar, sum als ikki klára tað. Men eg havi ikki merkt nakað til, at tað er keðiligt.

Eg eri enntá spurdur um eg og hasin gamli maðurin eru vinmenn. So tað kann ikki sigast annað enn, at vit finna væl útav tí saman.

Tað besta við at vera feðgar er at vit eru so líkir. Vit skilja hvønn annan sera væl. Og... Ja, tað riggar bara hjá okkum.

Á einum skala frá 1 til 10 fær hann eitt 8 tal frá mær.

### Matur

Besti maturin er uttan iva mammusa matur. Hon skuffar ongantíð.

# FEÐGAR Á FERÐ: Bogi og Birgir



## Birgir Krossteig hevur orðið:

Eg eri føddur í Klaksvík 1. mai 1956. Uppvøksturin í Klaksvík var góður. Evnini at gerast handverkari vóru óivað løgd har. Vit smádreingir smíðaðu nógvar „hyttir", drassaðu timbur, tjørupapp, kabússir og annað byggitilfar niðan á stykkið hjá okkum og onkutíð niðan um bøgarðarnar.

Annars arbeiddu vit við at landa saltfiskabátarnar í summarfrítíðini. Eg minnist hetta sum eina sera góða tíð.

Liðugur við 8. flokk fór eg til skips. Vit vóru 3 dreingir úr sama flokki, sum royndu sjólívið í eina tíð. Seinni fekk eg lærupláss á bedingini í Klaksvík sum jarnsmiður. Har var eg í læru í umleið 1 ár, men gavst og fór aftur til skips. Eg royndi eisini farmasigling í Grønlandi.

### HF-skúlin í Klaksvík

Lunnar til at blíva múrari vóru lagdar í Klaksvík. Eg arbeiddi sum múraraarbeiðsmaður hjá tveimum donskum múrarum, sum innrættaðu HF-skúlan í Klaksvík. Hesir góvust í „hálvum gekki" og eg átók mær at gera arbeiði liðugt við vegleiðing frá Henry Hansen, sum um hetta mundi var múrarameistari í Tórshavn.

Hesin Henry fortaldi mær um ein annan múrarameistara í Havn, sum søkti eftir múraralærlingi.

### Í múraralæru

So varð farið til Havnar. Eg skrivaði undir sáttmála við Jørgen Kyster múrarameistara tann 1. apríl 1976. Eg minnist mínar fyrstu dagar til arbeiðis sum lærlingur. Vit arbeiddu uppi á Snobbhill, múrarasveinurin var danskur hermaður, sum arbeiddi sum múrari í sínari frítíð. Hesin sami danskari bleiv lærari hjá mær 3. skúlaskeiðið eg var í DK – sera dugnaligur múrari.

### Reinhold og Harry

Teir hjá Kyster, sum eg arbeiddi mest saman við í míni lærutíð, vóru Reinhold Jacobsen, múrari og Harry Jacobsen, arbeiðsmaður. Reinhold var mín lærisveinur. Av hesum báðum monnunum havi eg lært sera nógv, og teir vóru ótrúliga arbeiðssamir. Reinhold andaðist fyri nógvum árum síðani. Eg kenni ongan, sum er so arbeiðssamur sum Harry, og hóast hann nærkast teimum 80 er hann „still going strong". Tað hevur verið mær ein sonn gleði at hava arbeitt saman við Harry.





Teir sum lærdu um somu tíð sum eg vóru Ólavur, skopuningur, Magnus Petersen (Manni) úr Froðba og Sofus Dahl Christiansen úr Havn.

At læra til múrara i Føroyum krevur, at tú skal til DK á tekniska skúla einaferð um ári. Fyrsta ári 20 vikur, og fylgjandi trý árini 6 vikur um árið (nú er tað blivið til ávikavist 20 og 3x10 vikur). Eg var á Rødovre Tekniske Skole. Mær dámdi sera væl skúlatíðina í DK, skúlin var sera væl skipaður og lærararnir vóru dugnaligir.

### Lærutíðin

Arbeiðspláss, sum eg minnist frá mínari lærutíð vóru: Telefonhúsið í Miðvági, Flakavirkið Polarfrost, Skúlin í Vági, Eysturskúlin, Bacalao, Auto Service, Svenn Krosstein, Nýggja Útvarphúsið og eitt ótal av baðirúmum.

Samarbeiðið millum meg og Jørgin Kyster gjørdist sera gott. Eg fekk ábyrgd av fleiri arbeiðsplássum og gjørdist formaður tá lærutíðin var úti.

Fyrstu stóru uppgávurnar, sum múraraformaður, var Svimjihøllin í Gundadali og múraraarbeiðið í Norðurlandahúsinum. Tað var ein sera krevjandi og lærurík tíð.

Eg havi eisini verið Uppi á Knúki í Mykinesi, og í fjøllunum í Vágunum. Hetta vóru arbeiði, sum vóru gjørd fyri Telefonverkið.

### Tekniskur hjálpari

Trupulleikar við lendunum gjørdi, at eg fór aftur á skúlabonk og bleiv liðugur sum tekniskur hjálpari í 1988. Eg arbeiddi eitt stutt tíðarskeið hjá Súna Dalsgaard arkitekti. Har loysti eg ymisk minni projekt. 1. desember 1988 fekk eg arbeiði hjá Una Patursson verkfrøðingi. Uppgávan eg fekk bjóða var, at standa fyri byggileiðsluni á nýggja Millumbylgju-sendaranum í Akrabyrgi; tað var eina sera spennandi uppgáva. At so sami sendari gjørdist „verðinsberømtur" í tíðindaflutninginum Føroyum, er ein onnur søga.

### Kreppan

KREPPAN fyrst í 1990'árunum rakti – eins og nú – byggivinnuna meint. Arbeiði var onki at fáa.

Eg valdi síðani at royna meg sum múrarameistara, og havi arbeitt sum tað síðani. Mær

dámar mítt arbeiði framvegis væl. Uppgávur sum vit hava loyst hesi árini kunnu síggjast á heimasíða okkara www.krossteig.fo.

### Børn

Vit eiga fýra børn: Ragnar er 28 ár, Bogi er 23 ár og tvíburðagenturnar, Barbara og Bára eru 20 ára gamlar.

### Hann vildi vera múrari

Bogi valdi at blíva múrari sum pápin. Eg havi ongantíð sagt at hann skuldu blíva múrari, men vit hava tosað nógv saman um arbeiði, útbúgvingar v.m.

Eg minnist væl tann dagin hann sum 12-13 ára gamal segði seg vilja verða múrari. Hann helt tað vera „keðiligt" at ongin skuldi halda fram, tá ið eg ikki tímdi meira. Hetta fekk meg at hugsa um allar tær keðiligu søgurnar um pápar, sum hava verið lærumeistarar hjá soninum.

Men eftir sum hetta var hansara ynski vildi eg royna tað.

Bogi kom so í læru hjá pápanum tann 15. februar 2005 og var útlærdur 14. november 2008.

### Ansaði væl eftir

Eg ansaði væl eftir ikki at „geva honum skyldina" um okkurt ikki gekk, sum tað skuldi á arbeiðsplássunum. Heldur royndu vit at tosa saman um, hvussu trupulleikarnir kundu loysast á besta hátt.

Eg má bara siga, at tað hevur eydnast sera væl. Vit verða ofta spurdir um vit eru vinmenn ella feðgar. Vit hava tað gott og skemtiligt saman – bæði á arbeiðsplássinum og heima.

At Bogi valdi at blíva múrari er gott. Ein góð handverkara útbúgving er góð barlast at hava. Serliga nú, tá ætlan hansara er eisini at fara undir víðari lestur innan byggivinnuna.

### Birgir um Boga

Bogi hevur frá barnsbeini veri sera nemmur at hava við at gera, altíð glaður og væl nøgdur. Hann hevur eitt sera lætt lyndi, er lættur at arbeiða saman við, dugir væl at stýra einum arbeiðsplássi og er næstan ikki til at fáa øði í.

### Tónleikur

Mín áhugi fyri sangi og tónleiki byrjaði í Betesta í Klaksvík. Har var nógvur sangur og tað dámdi mær væl. Seinri kom so fyrsti plátuspælarin í húsið, og tær fyrstu pláturnar eg minnist eru:

„Oh oh what a kiss", Hepp Stars og Elvis. Eisini minnist eg at grannin átti singulplátur við Betestakórinum. Ávirkanin frá The Beatles var stór. Somuleiðis øll „tey góðu gomlu" rock-nøvnini so sum Jethro Tull, Uria Heep, Deep Purple, Genesis og nógv onnur góð orkestur.

Pink Floyd hevur sína heilt serligu stjørnu hjá mær. Fyrstu fer eg hoyrdi hendan bólkin var í eini íbúð í St. John í New Foundlandi í 1973; tað var sjálvandi tann legendariska „Dark side of the Moon". Síðani havi eg trúgvur fylgt gomlu Pink Floyd manningini – bæði saman og hvør sær.

### Matur

Mær dámar best føroyskan mát: Turt og ræst kjøt, spik, turra grind og turran fisk.




MINKA UM ORKUNÝTSLUNA Í BÚSTAÐNUM

ORKULÁN

Vit veita fígging til orkusparandi tiltøk í sethúsum og íbúðum

Eigur tú hús ella íbúð, sum tú ætlar at endurnýggja ella umbyggja, er møguleiki at fáa lán frá Húsalánsgrunninum, um tiltakið er orkusparandi.

Húsalánsgrunnurin veitir fígging til m.a. bjálving, nýggj vindeygu, nýggjan húsaklædning, nýtt tak, hitaskipan.

Vilt tú hava meira at vita um orkulán frá Húsalánsgrunninum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Ring ella støkk inn á gólvið Yviri við Strond, Tórshavn.

Húsalánsgrunnurin
Yviri við Strond 6 · 100 Tórshavn
Telefon 314583 · www.husalansgrunnurin.fo

ANNIJANNI

# rør-tænastan

v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80

Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

# Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

## Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)



**MEST**

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Húsavarðartænastan 10 ár 2001 - 2011



# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*

sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*



NÝTT

## Reinsa við turr-ísi

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.



NÝTT

## Betong-saging

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

**Húsavarðartænastan**

# TÓRBJØRN PETERSEN: BRÁTT 46 ÁR Í STARVI HJÁ SOMU FYRITØKU


*Karstin Tórbjørn Petersen*


*Barnamynd av Tórbjørn*

Karstin Tórbjørn Petersen, vanliga bara nevndur Tórbjørn, man vera ein tann kendasti handverkarin í Føroyum.

Hann hevur arbeitt sum blikksmiður og VVS maður hjá P/F Mariu Poulsen í

í skjótt 46 ár. Tórbjørn er føddur á Norðoyri 15. juni í 1948.

Pápin, Mathias Petersen, var av Selatrað, og mamman Karin, fødd Høgnesen, var ættað av Norðoyri.

Tórbjørn greiður okkum frá, at tá foreldrini vóru gift búðu tey fyrstu tíðina úti á Norðoyri. Seinni fluttu tey norð á Kósina. Undir krígnum bygdu tey sær nýggj hús á Gerðareiði. Í 1945 fluttu tey inn í nýggju húsini, har Tórbjørn eisini er uppvaksin. Tey eru 6 systkin, 4 systrar og 2 brøður.

Tórbjørn minnist, at pápin gekk høgt uppí, at ongin løta skuldi fara til spillis, hann var altíð tíðliga á fótum. Tórbjørn var vaktur snimma á morgni, eisini í summarfrítíðini ella, tá ið aðrir frídagar vóru. Eins og aðrir dreingir


*Pápin, Mathias Petersen og mamman Karin, fødd Høgnesen.*

í Klaksvík var Tórbjørn altíð fúsur at fara norð á Kósini at landa fisk frá trolarum, tá høvi beyðst.

Tórbjørn byrjaði barnaskúlan í skúlanum á Ziskatrø í 1955. Um hetta mundi var Gamli Skúli eisini brúktur, men har vóru fáar skúlastovur. Í 1963 var hann liðugur við barnaskúlan, og hevði ikki hug at halda fram við skúlagongdini.

Tá hevði Kjølbro stórt handils- og reiðaravirksemi í Klaksvík. Í hesum sambandi fortelur Tórbjørn eina áhugaverda søgu. Hann greiður frá, at tá fingu øll, sum arbeiddu hjá Kjølbro eitt arbeiðsnummar. Hetta skipaði skrivstovan hjá Kjølbro fyri. Tórbjørn minnist, at hann hevði nr. 626 og pápin nr. 349.

## Sjólívið

Tórbjørn hevur eisini roynt sjólívið. Fyrsti túrurin, hann var til skips, var við Polarstjørnuni í summarfrítíðini 1962. Hann minnist, hvussu ringur hann var av sjóverki. Og sum so mangur annar – í hesi støðuni – angraði hann, at hann var farin henda túrin.

Hann minnist, at tá teir sóu land – á veg heim – kom ein av manningini so blíður at práta við Tórbjørn. Men áðrenn hann visti av fekk hann eina sótuta pannu eitt vist stað. Tá skilti hann, at hetta var fastur táttur, tá drongur var fyrsta túrin til sjós.

Tá av tornaði fekk hann 500,- kr. fyri túrin, og keypti sær eina súkklu fyri pengarnar.

Tórbjørn royndi eisini at vera á sild við gørnum. Hetta var við Hólmasund, einar 4 – 5 túrar. Jóan Magnus Lamhauge úr Lamba var skipari og Erhard Ziska Dahl úr Klaksvík var motorpassari.

Fiskasentralurin í Havn átti Hólmasund; um somu tíð áttu teir eisini Silvurspray.

Eitt stutt skifti róði Tórbjørn út við Brattenni, og á vári 1964 var hann ein túr við Sjúrðarberg undir Íslandi, Sámal Sivertsen var skipari.

## Í læru hjá Jákup Blikk

20. juni 1964 fór Tórbjørn at læra til blikksmið hjá Jákup Jacobsen. Í Klaksvík var hann vanliga bara nevndur Jákup Blikk. Tá Tórbjørn byrjaði at læra vóru teir tveir lærlingar. Júst Matras av Norðoyri hevði tá verið í læru í 2½ – 3 ár hjá Jákup Blikk.

Jákup Blikk hevði verkstað í kjallaranum heima við hús. Mest vanliga arbeiði tá var rørarbeiði; ein stórur partur av arbeiðinum var at gera takrennur úr sink.

Ein vaksandi partur av arbeiðinum um hetta mundið var at installera miðstøðuhita og sanitet.

Hetta var tíðin, tá mong húski løgdu um frá at brenna kol og torv. Í staðin varð farið yvir til at brúka oljufýr til ketlarnar. Um hetta mundi og seinni var tí nógv arbeiði av slíkum slag at gera um alt landið.

Her leggja vit til merkis, at Tórbjørn hevur sera gott minnið; hann greiðir frá, at um hetta mundi fekk ein 1. árs lærlingur 33 kr. og 60 oyru um vikuna, og tá var arbeiðsvikan 44 tímar.

## Til Havnar vit fara ...

Tá Tórbjørn hevði lært hjá Jákup Blikk í eitt ár hevði hann hug at sleppa at læra á einum størri verkstaði. Tí søkti hann um at sleppa at halda fram við læruni hjá Mariu Poulsen í Havn, og hann var heppin og fekk játtandi svar.

Hann minnist, at hann kom til Havnar 21. juni 1965, og at hann 22. juni 1965 byrjaði læruna hjá Mariu Poulsen.

Nú gjørdist Tórbjørn so smátt havnarmaður, men leggur dent á, at hann er errin av at vera klaksvíkssjingur.

Tórbjørn flutti ongantíð aftur til Klaksvíkar

at búgva, síðst í 1967 fluttu foreldrini við yngru systkinunum til Havnar at búgva.

Hetta er tíðin, tá nógv fólk flutti av bygd til Havnar at búgva. Talan var um fólk úr øllum landinum. Stórur tørvur var á arbeiðsmegi í Havn, tað var serliga byggivinnan, sum kravdi arbeiðsmegi sum ongantíð fyrr. Fólkatalið í Havn vaks við rúkandi ferð, og avbygdarfólk fluttu inn í kjallaraíbúðir, sum havnarfólk vóru farin at innrætta til íbúðir at leiga út. Hetta var góð ískoytisinntøka hjá mongum í Havn.

## Læruárini hjá Mariu Poulsen

Sambært lærukontraktini byrjar læran 22. juni 1965. Á lærubrævinum stendur hetta um lærlingalønina:

22. juni 1965 = 12,5% av sveinalønini.
22. juni 1966 = 15% av sveinalønini.
22. juni 1967 = 22,5% av sveinalønini.

Byrjunarlærlingalønin var 50,- kr. um vikuna. Tað síðsta ½ árið var lønin 200,- kr. um vikuna. Fyri yvirtíð var lønin 4,30 um tíman at byrja við, men hækkaði upp í 5 krónur nakað seinni. Tórbjørn var liðugur at læra 21. juni 1968, og greiðir frá, at síðsta árið var vikulønin 200,- kr.

Í hesum sambandi nevnir Tórbjørn, at fyrsta árið hann var í Havn fekk hann 500,- kr. í studningi frá Landsstýrinum, annars hevði hann bara lærlingalønina og yvirtíðarlønin at dúva uppá.

At leiga eitt kamar í Havn kostaði um hetta mundið 130,- kr. um mánaðin.

Tórbjørn hevur goymt nakrar lønarseðlar, og sambært einum lønarseðli frá Mariu Poulsen var lønin seinna hálvár 1965 (25/6-1965 til 31/12-1965) tilsamans 2.652,39 kr.

## Tekniski Skúli

Um hetta mundi var Tekniskur skúli í Klaksvík eftir arbeiðstíð um kvøldið. Um sama mundi var Tekniski Skúli í Havn dagskúli, skúlin hevði innivist í gomlu húsunum hjá Føroya Banka í Tórsgøtu. Tað er húsið, sum nú verður brúkt til pensionistar at koma saman í. Húsið verður í dag vanliga nevnt Tilhaldið.

Tórbjørn greiðir okkum frá, at Johan Ziska var skúlastjóri í Tekniska Skúla og, at Arnold Nielsen úr Sumba var lærari í rokning og matematikk. Ein annar lærari var Jóan Pauli Zachariasen úr Vestmanna, hann var jarnsmiðjur.

Tá Tórbjørn byrjaði at læra hjá Mariu Poulsen var Martin Wilhelmsen formaður á verkstaðnum og hann gjørdist lærumeistari hjá Tórbjørn.

Tórbjørn veit bara gott at siga um Martin, hann var altíð væl gjørdur, og hevði sera góðar hendur, hann var eisini góður og fyrimyndarligur lærumeistari.

Martin Wilhelmsen byrjaði at arbeiða hjá Mariu Poulsen í 1935, og var har til 1969, tá hann av sjúkuávum mátti leggja frá sær; hann var ringur av liðagikt.

Eftir Martin gjørdist Hákun Mortensen smiðjumeistari; hann var í fyritøkuni til 1975. Hákun hevði eisini stak góðar hendur. Tórbjørn var fastur lærlingur hjá Hákun, tá hús skuldu hava miðstøðuhita, og var akordin góð, so dryppaði eisini á lærlingin. Hákun fór seinni at arbeiða fyri seg sjálvan.

## Grímur góður arbeiðsfelagi

8. februar 1949 gjørdist Grímur Kamban á Dul stjóri hjá Mariu Poulsen. Tórbjørn minnist, at tá Grímur gjørdist stjóri arbeiddu 17 mans á verkstaðnum, tað er við lærlingum.





*Ein partur av sveinastykkinum, ketil úr blikk.*

Tórbjørn leggur dent á, at Grímur var ikki bara ein góður stjóri, men eisini ein góður arbeiðsfelagi. Í hesum sambandi fortelur hann, at hann minnist, at einaferð hann skuldi til Klaksvíkar at fylgja, kom hann í eina keðiliga støðu. Hann hevði egnan bil, men tá hann skuldi fara úr Havn gekk koplingin á bilinum fyri. Tá hann løtu seinni møtti Grími sigur hann „Nú – er tú ikki farin enn“?

Tá mátti eg svara, at tað verður nokk av ongum, tí koplingin á bilinum var gingin fyri. Tá sigur Grímur, far heim til okkara, og sig við Andreu, at lykilin hongur á naglanum í køkinum, bið hana geva tær hann, og so fert tú bara avstað. Hann var skjótur at rætta eina hjálpandi hond.

Hetta sigur nógv um, hvussu góð viðurskiftini vóru millum arbeiðsfólki og stjóran. Grímur var stjóri til hann andaðist 14. desember í 1987, 69 ára gamal.

Tá tók sonur hansara Kristian á Dul við stjórastarvinum.

Í 1976 tók Torbjørn við sum formaður á verkstaðnum og hevði hetta álitisstarv til 2001.

## Sveinastykkið

Tá lærutíðin í 1968 var liðug skuldi sveinastykkið gerast. Sveinastykkið fevndi um fleiri uppgávur. Her kann eg nevna, at eg skuldi gera eina tekning av einum ketli, og so gera ketilin eftir tekningini úr blikk. Sí mynd av ketlinum.

Av øðrum kann eg nevna uppsetan av vaski, sum skuldi forbindast við øllum, sum hartil hoyrir. Og so var ein sveisiroynd.

2 – 3 arbeiðsdagar vóru settir av til at gera sveinastykkið. Tórbjørn greiðir frá, at alt skuldi vera liðugt 14. november 1968, og tað gjørdist ongin trupulleiki.

## Búði til leigu

Fyrstu árini eftir, at Tórbjørn var komin til Havnar búði hann hjá systur síni Kirstin, sum var gift við Janus Ljósheim. Tað var úti í Perskonugøtu, í húsunum hjá Axel Jensen.

Eitt stutt skifti leigaði hann eitt verilsi í Geilatúni 12 hjá Poul D. Hansen, tá var leigan 130,- kr. um mánaðin.

Tá systurin og Janus Ljósheim høvdu keypt hús við Velbastaðvegin flutti Tórbjørn til tey at búgva.

## Mest vanliga arbeiði

Tá vit spyrja Tórbjørn, hvat var tað mest vanliga arbeiðið hetta tíðarskeiðið, greiðir hann frá, at mest var at gera á verkstaðnum. Tað var t.d. at gera inndekningar, takvindeygu og sinktakrennur. Eisini vóru líkkistur, sum skuldu loddast til.

Til skipini var nógv arbeiði at gera. Tá vóru flestu matíløt úr blikk, t.d. ketlar, supputarinir, grýtur, kakuformar og dyllur til mjólk.

Grýtur, sum gjørdar vóru at kóka epli í umborð á skipi, vóru fýrkantaðar. Tær vóru

nevndar osagrýtur og vóru eisini úr blikk. Í heila tikið var blikk nógv brúkt til ymisk mat-íløt.

Vit gjørdu eisini ventilar til maskinrúm.

Nógv arbeiði var eisini av at umvæla skips-lanternur. Tá vit høvdu umvælt lanternurnar skuldu tær niðan til Hans Sundstein at góðkennast. Tá tær vóru góðkendar vóru tær merktar við einum nummari.

Sinkið, ið varð innflutt, var pakkað inn í krossvið; mest varð brúkt av tí, sum var nevnt nr. 11, 12 og 14.

Av øðrum arbeiði, sum varð gjørt á verk-staðnum, kann eg nevna, at ofta vóru vit bidnir um at gera stakitt og portur. Vit umvældu eisini primussar, minnist eg rætt, so átti Theodor Hansen tann seinasta, sum varð umvældur á verkstaðnum.

Tað mest vanliga arbeiðið úti á markini var í sambandi við vatnleiðingar; vit vóru t.d. inni í myndini, tá vatn skuldi leggjast inn í hús.

## Tórbjørn formaður og lærumeistari

Tá Hákun Mortensen í 1976 gavst at arbeiða hjá Mariu Poulsen hevði hann arbeitt í fyritøkuni í 31 ár.

Eftir Hákun gjørdist Tórbjørn formaður á verkstaðnum.

Í einum brævi, sum Føroya Læruráð sendi fútanum 7. februar 1986, verður tikið soleiðis til: Hervið verður gjørt kunnugt, at soljóðandi skriv er í dag sent hiðani til Føroya Landfúta: „Góðkenning av lærimeistara – rør og blikk-smíð.

Vísandi til fyrispurning fútans, dagfest 3. februar 1986, verður við hesum sagt frá, at K. Tórbjørn Petersen, blikksmiður, út frá fyriliggjandi upplýsingum, verður góðkendur at standa til svars fyri upplæringini av rør- og blikksmiðju-lærlingum hjá P/F Maria Poulsen og Co. Avrit av hesum brævi er sent P/F Mariu Poulsen. L.v. Jógvan Hammer".

Lat okkum her nevna, at Tórbjørn hevur haft eitt stórt tal av lærlingum undir síni kønu hond. Helst er óneyðugt at skoyta uppí, at hann var dugnaligur og væl umtóktur læru-meistari. Tórbjørn var formaður á verkstaðnum árini 1976 – 1999.

## Tórbjørn hittir Onnu

Tá ið Tórbjørn var um at vera útlærdur hittir hann Onnu av Reyni; tey gjørdust góð og giftust 6. februar 1971.

Tórbjørn og Anna eiga 4 børn: Anja f. 1971, Sigird f. 1973, Karin f. 1975 og Karstin f. 1990. Higartil eru 7 abbabørn og 1 langabbabarn.

## Tórshavnar uttanbíggja kommuna

Í 1970 fór Føroya Jarðarráð undir eina heilt óvanliga uppgávu. Forsøgan er tann, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum í Suðurstreymi – um hetta mundi – var heilt óvanliga stórur. Tórshavnar kommuna, sum í dag stendur fyri mest sum øllum útstykkingum í Suðurstreymi, hevði ongan kjans at nøkta tørvin. Kommuna átti onga jørð og slapp heldur ikki framat jørð, sum kundi útstykkjast til grundstykkir.

Hesin trupulleiki stóð við og vaks í nøkur ár.

Her eigur at verða nevnt, at tá var ikki allur Suðurstreymur í eini kommunu. Tá vóru t.d. Argir og Hoyvík ikki partur av Tórshavnar kommunu, men vóru við í eini kommunu, sum hevði heiti Tórshavnar uttanbíggja kommuna. Henda kommuna varð seinni løgd saman við Tórshavnar kommunu.

Og tað, sum Tórshavnar kommuna – í hesum sambandi – ikki megnaði, tað megnaði Tórshavnar uttanbíggja kommuna. Tað komst av, at Jarðarráðið var sinnað at lata stór øki av almennari jørð í Hoyvíkshaganum til grundstykkir.

Hetta øki var ein natúrligur partur av Tórshavnar uttanbíggja kommunu, og tí komu tey, sum búsettust har ikki at vera borgarar í Tórshavnar kommunu, men í Tórshavnar uttanbíggja kommunu.

Fyrsta útstykkingin í Hoyvíkshaganum var øki við Mannbrekku.

## Keypa grundstykki í 1973

Av tí, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum framvegis var stórur, var skjótt farið undir útstykking nr. 2 í Hoyvíkshaganum. Henda útstykkingin fevndi m.a. um gøtuna, sum fekk navnið Oman Hoydalar.

Tá høvdu Tórbjørn og Anna søkt um grundstykkið, og sluppu eisini upp í part. Tey keyptu grundstykkið í 1973, men fóru ikki alt fyri eitt undir at byggja.

Til stuttleikar nevnir Tórbjørn, at tey fluttu inn í nýggju húsini fríggjadagin 13. november 1982.

Hesin nýggi býarparturin fekk løgna navnið „Snobb Hill". Í hesum sambandi fortelur Tórbjørn eina stuttliga søgu um eitt bræv, sum hann fekk frá Valdemar Lutzen í Havn. Á brævbjálvanum stóð – stutt og greitt – Tórbjørn Petersen, Snobbhill. Tað undraði sjálvandi, at brævið kom fram, tí har stóð onki gøtunavn og onki um hvørja bygd ella bý talan var um.

Hetta hevði valla gingið í dag, men um hetta mundi vistu tey flestu, hvar Snobb Hill var.



*Anna, kona Tórbjørn og ein ommudóttir.*

## Sjúkratrygging og Eftirlønargrunnur

Meðan vit sita og práta nevnir Tórbjørn, at hann eina tíð í 1999 hevði kent á sær, at okkurt ikki var sum tað átti. Hann fór kortini – í fyrsta umfari – ikki til lækna. Men tá hetta stóð við fór hann til lækna, og tá hann varð kannaður vísti tað seg, at hann hevði hjartatrupulleikar. Tá valdi Tórbjørn at gevast sum formaður á verkstaðnum. Eftir hetta hevur hann mest sum bara tikið sær av servisarbeiði.

Her kunna vit skoyta uppí, at í dag hevur Havnar Handverkarafelag eina

sjúkratrygging, sum tekur við, tá limirnir koma í eina slíka støðu.

Tórbjørn er fegin um, at Havnar Hand-verkarafelag hevur tikið stig til ein Eftirløn-argrunn. Men hann leggur afturat, at hann tí verri kom ov seint upp í Eftirlønargrunnin.

Hann sigur, at hann ikki visti av, at hann sum meistari kundi gjalda inn í Eftirlønar-grunnin, og tí blíva árini so fá har, men eitt stak gott tiltak, leggur hann at enda afturat.

# KRISTIAN Á DUL UM TÓRBJØRN



Tórbjørn Petersen byrjaði í 1965 á verkstaðnum hjá Mariu Poulsen í Tórsgøtu 10, har okkara búnýtishandil í dag heldur til.

Tað var Grímur á Dul, sum setti Tórbjørn í starv, og vóru teir altíð sera væl, og arbeiddu væl saman.

Síðani hevur Tórbjørn fylgt fyritøku okkara gjøgnum góðar eins og ringar tíðir. Tá minni arbeiði hevur verið í byggivinnuni hava vit haft færri rørleggjarar á verkstaðnum, men tað hevur altíð verið tørvur á Tórbjørn. Miðskeiðis í sjeytiárunum var Tórbjørn einasti rørsmiðjur á verkstað okkara. Hann hevur eisini verið leiðari á verkstaðnum hjá Mariu Poulsen í góð 20 ár; bæði á rør- og blikksmiðjuni.

Tórbjørn er avhildin handverkari bæði hjá leiðslu, starvsfeløgum og hjá kundum okkara.

Flestu av kundunum hjá Tórbjørn eru kundar, sum hann hevur arbeitt javnan hjá, og sum spyrja eftir Tórbjørn tá teir hava arbeiði, sum skal gerast. Tað kemur javnan fyri, at boð eisini eru eftir Tórbjørn frá starvsfeløgum, sum vilja hoyra hvussu hann vildi loyst eina uppgávu.

Tórbjørn er sera góður við Mariu Poulsen, hetta fáa ungu lærlingar okkara at kenna, tá ið hann við sínum drúgvu royndum, kann greiða teimum frá, hvussu ymisku arbeiðini skulu loysast.





# Vinnugrundstykki á Skarðshjalla til sølu

**Nú hevur tú møguleikan at ogna tær byggibúgvi vinnugrundstykki á Skarðshjalla.**

Sum framhald av útstykkingini á Sandvíkarhjalla, útstykkjar kommunan umleið 15.800 fermetrar til vinnugrundstykki á Skarðshjalla.

Grundstykkini eru ætlað til framleiðsluvinnu, byggivinnu, bilasølu, verkstaðir og líknandi vinnur, sum eru umhvørvisflokkaðar í flokki 3 til 6.

**STØDD AV GRUNDSTYKKJUM**
Støddin á grundstykkjunum verður millum 800 og 1.800 fermetrar.

Grundstykkini verða útgrivin og grovplanerað, og verður fjarðhiti, vatn, kloakk og el lagt inná hvørt stykkið.

**Kostnaður**
Mettur fermeturprísur er. kr. 1.250,00

Helvtin av metta kostnaðinum, fellur til gjaldingar við undirritan av fyribilsskeyti, og restin fellur til gjaldingar, tá ið økið er liðugt byggibúgvið og grundstykkini eru matrikulerað.

**Tíðarætlan**
Fyrstu stykkini verða ætlandi byggibúgvin á heysti 2011.

**FLEIRI UPPLÝSINGAR**
Um tit vilja ogna tykkum eitt stykki, ella um tit hava spurningar í hesum sambandi, kunnu tit venda tykkum til løgdeildina á telefon 302010 ella senda okkum teldubræv á torshavn-@torshavn.fo

Tað skal viðmerkjast, at nøkur av stykkjunum eru avløgd.

Sí annars meira á torshavn.fo.

www.torshavn.fo

# SØGAN AFTANFYRI P/F MARIA  POULSEN



*Verkstaðið í Tórsgøtu í 1915*

Fyrsti føroyingur, ið lærdi blikksmíð í Føroyum, var Mortan Mortensen, vanliga nevndur Morten Blikk.

Mortan Mortensen byrjaði læruna í 1900, lærumeistari var Ludvig Poulsen, ið hevði lært blikksmíð í Danmark.

Pápi Ludvig Poulsen hevði eisini lært blikksmíð í Danmark. Hann varð nevndur Johan Poulsen; føddur í Havn í 1815. Johan Poulsen fór í 1835, 20 ára gamal, úr Føroyum til Keypmannahavnar at læra blikksmíð, læran tók honum 6 ár.

Tá hann var útlærdur fór hann, sum mangir aðrir handverkarar tá, til Týsklands at vita um hann ikki kundi læra meira innan faki. Í Týsklandi arbeiddi hann sum blikksmiðjur í 7 ár; m.a. í Berlin, Leipzig og Bremen.

### Blikksmiðja úti á Reyni

Heimafturkomin í 1848 bygdi hann sær blikksmiðju úti á Reyni; hetta var fyrsta veruliga blikksmiðjan í Føroyum. Johan Poulsen arbeiddi í smiðju síni til hann andaðist 3. juli 1878.

Um hetta mundi arbeiddu tveir synir hansara saman við pápanum. Tann eldri – Johan Carl Poulsen – fekk hug at royna aðrar leiðir, og flutti til Keypmannahavnar har hann fór at lesa jura og tók embætisprógv sum juristur. Hann flutti ikki aftur til Føroya at búgva.

Ein yngri sonur Johan – Ludvig Poulsen – var 13 ára gamal, tá pápin doyði. Hóast hann var ungur, tá pápin doyði, var hann longu tá farin at arbeiða í smiðjuni hjá pápanum.





*Ludvig Poulsen*

### Ludvig til Danmarkar at læra

Ludvig hevði góðan hug og hegni til smiðjuarbeiði, hóast hann ikki hevði sveinabræv. Í 1883 flutti hann til Keypmannahavnar at læra blikksmíð. Eftir lokna læru og sveinabræv í hondini flutti hann aftur til Føroya.

Í 1883 hevði Ludvig bygt sær smiðju á Høgareyni, og fór undir egið blikksmiðjuvirki. Um heystið 1900 fór hann eisini undir at reka handil, ið fyrstu tíðina mest seldi búnýtisvørur, køkslutir, postalín og glas.

Í 1901 keypti Ludvig Poulsen eitt grundstykki í Tórsgøtu. Nøkur ár seinni fór hann undir at byggja, og í 1906 flutti Ludvig alt virksemi – smiðju og handil – av Høgareyni oman í Tórsgøtu. Hesi hús hava verið millum tey størstu í Havn tá, og hýsa í dag búnýtishandlinum hjá P/F Mariu Poulsen.



*Gamli handilin hevði "útstilningsvindeygu" út ímóti Tórsgøtu.*

Ognirnar á Høgareyni seldi Ludvig Poulsen til bryggjaríið Ydun.

Tað sum eisini eigur at verða nevnt her er, at tá Ludvig Poulsen doyr í 1938, tekur kona hansara, Maria Poulsen, við stjórastarvinum. 22. mai 1944 stovnar Maria Poulsen eitt partafelag við navninum „Hjá Ludda". Hon rekur so fyritøkuna víðari undir hesum navni. 5. januar 1945 broytir hon navnið á partafelagnum til P/F Maria Poulsen & Co.

### P/F Maria Poulsen

Í 1949 selur Maria Poulsen fyritøkuna til brøðurnar Jógvan, Grímur, Jákup og Páll á Dul, og 8. februar 1949 verður Grímur á Dul stjóri. Teir broyta kortini ikki navnið.

Her kunnu vit eisini nevna, at Maria í Skorðini vanliga nevnd Mia, arbeiddi hjá P/F Maria Poulsen í 40 ár.

Núverandi stjórin í fyritøkuni, Kristian á Dul, hevur arbeitt hjá P/F Mariu Poulsen síðani 1970, tá hann byrjaði sum skrivstovu-lærlingur. Kristian tók við stjórastarvinum, tá pápin andaðist í 1987.

P/F Maria Poulsen hevur framvegis búnýtishandil í húsunum, sum Ludvig Poulsen bygdi og flutti inn í 1906.

Dóttir Kristian, Súsanna á Dul, er í dag leiðari í búnýtishandlinum.

Verkstaðið og handilin hjá P/F Mariu Poulsen var í húsunum, sum bygd vóru í 1906, til fyritøkan bygdi nýggjan bygning á Hálsi í 1982.

Í 1988 keypti P/F Maria Poulsen granna-bygningin, sum Hans M. Reinert hevði bygt nøkur ár frammanundan. Hesin bygningur hýsir í dag verkstaðnum hjá P/F Mariu Poulsen.



*Grímur á Dul, pápi Kristi, sum nú er stjóri.*

*Kristian og dótturin Súsonna*




Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo
DEWALT
BYGMA
BALSLEV
...til handverkaran


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
sansir.fo
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar


Heildarloysnir
frá Articon
sansir.fo
ÁRSINS
VIRKI 2008
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR
www.tst.fo
skapandi umhvørvi
Tekniski Skúlin
.... ein virkin og góður samstarvsfelagi
Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum
samstarvi við vinnu og lærling
• vit seta lærlingin í miðdepilin
• vit nøkta tørvin hjá vinnuni
• vit hava høgan námsfrøðiligan
og fakligan førleika
Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið
Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

# BAROMETRIÐ: RASMUS RASMUSEN



**Rasmus Rasmussen,** húsavørður í Nærverkinum svarar.
**Aldur:** 66 ár
**Unnusta:** Maria Marielsdóttir; hárfríðkanarkvinna
**Børn:** Meibritt 41 ár, Ólavur 42 og Torkil 27 ár.

**Elektromekanikari:** Pápi mín, Ólavur Rasmussen, var elektromekanikari, og hevði sítt egna verkstað í Havn. Tá eg skuldi fara í læru blivu vit samdir um, at tvey ár á einum elektroniskum verkstaði, og tvey ár á einum mekaniskum verkstaði vildi vera tað rætta.

Tí lærdi eg tvey ár hjá Wenzel Petersen innan jarnsmíð og tvey ár á elektromekaniska verkstaðnum hjá pápa mínum.

Hjá Wenzel Petersen var Pauli Næs lærumeistari.

**Nær byrjaði tú at læra:** Eg byrjaði at læra í 1962.

**Hvar gekk tú í Tekniskum skúla:** Eg gekk í Tekniska Skúla í Havn, í gamla Føroya Banka. Lærarar á Maskindeildini vóru: Børge R. Nielsen, Johan Ziska, Arnold Nielsen.

Á Eldeildini vóru Einar Mikkelsen og Daniella Olsen lærarar.

**Hvussu nógvar vikur gekk tú í skúla:** Vit gingu í skúla 4 x 6 vikur.

**Nær var tú útlærdur:** Eg var útlærdur á heysti 1966.

**Sveinastykkið:** Eg gjørdi tvey sveinastykkir. Annað var at dreyða ein dor til eina fresimaskinu. Og tað næsta var at vikla ein stator til ein 2,5 Hk el motor.

Jákup Mouritsen (Aggo) og Kaj Gaard vóru skuðumeistarar.

**Hvar hevur tú arbeitt sum sveinur:** Fyrstu tvey árini hjá Ólavi Rasmusen, og trý ár hjá Nordelektro í Keypmannahavn. Í 8 ár havi eg arbeitt sum lærari á einum vardum verkstaði í Farum, ið var tilknýtt Ebberødgaard. Og síðani havi eg arbeitt í 32 ár sum húsavørður innan Andveikaverndini, sum í dag er undir Nærverkinum, og kallast Trivnaðartænastan.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:** At vera úti á bygd og vera við til at seta bátaspøl og flótandi bátavognar upp. Og so at vera umborð á skipum at greiða ymiskt umvælingararbeiði. Tað var eisini áhugavert at arbeiða á herstøðini uppi í Mjørkadali. Tað var eisini nógv áhugavert arbeiði í 60-unum á verkstaðnum hjá pápa mínum. Har var eisini ein minni produktión av snellum, boyðulyktum og fiskapressum til saltfisk, sum skuldi sendast av landinum o.m.a. spennandi var at tríva í.

**Frítíðarítriv:** Myndlist, vinir, urtagarðsarbeiði v.m.

**Besta bók:** Det skal mærkes at vi lever hjá J. Møllehave og Benny Andersen.

**Besti sangur:** Eitt dýpi av dýrari tíð við Elin Heinesen.

**Besti filmur:** Anklagerens vidne v/Edvard G. Robinson.

**Besti sjónleikari:** Dustin Hofmann.

**Fartelefon:** Nokia.

**Telda:** ACER.

**Bilur:** Ford.

**Hvat heldur tú um eftirlønarskipanina hjá Havnar Handverkarafelag?** Hon er góð.

**Hvat heldur tú um samlagstryggina hjá felagnum?**
Hon er sera góð.

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá ein handverkara í dag?** Avbjóðingarnar eru størri nú, men tú skuldi vera meira genialur fyrr. Í dag er tað lætt at vera handverkari, alt er liðugt, tað skal bara skrúvast saman. Hvør fer og biður ein snikkara gera eitt skrivaraborð í dag? Tú fart eitt samlisett í Idé Húsinum, ella eina pappeskju í Skemmuni.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?** At hava 3 praktfull børn, og 4 væl skapt abbabørn.

**Hvat kann øsa teg?** Sjónvarpsgjaldið.


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
Battariír Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariír
VARTA
THE BATTERY EXPERTS
Heil- og smásøla, landsins bestu battariír, og landsins bestu prísir
PÓLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av lágorkutermorútum, u-virði niður í 0,4.
Einkultglas, spegl, herða glas til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo


Betri at binda um heilan fingur
Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.
Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.
Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.
Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjóns-viðurskifti. Meiri fæst at vita á telefon 345 700 ella við at senda ein teldupost til betri@betri.fo.
betri.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari
Betri pensjón